## U19 úttikið

Álvur Hansen og Magni Jarnskor, kvinnulandsliðsvenjarar hjá U19, hava úttikið teir 18 leikararnar, sum skulu umboða Føroyar í EM-undankappingini í Turkalandi í døgunum 18. til 24. oktober. Luttakandi liðini eru Holland, Írland, Turkaland og Føroyar. Tær úttiknu eru: Elin S. Holm og Katharina K. Saxov, AB, Helena H. Johannesen, B36, Íðum Magnussen og Elin Kruse, EB/Streymur, Tórhild Holm, Gunn M. Hentze, Birita Mortansdóttir og Bjarta Johansen, HB, Ása K. Thomsen, Sofía Purkhús, Sølva B. Andreasen, KÍ, Ansy Sevdal, Eir Hansen og Nina Davidsen NSÍ/B68, Birita Poulsen, Mirjam Debora Frederiksberg og Mirjam Johansen, Skála, Andrea Nielsen, VB/Sumba, Nelly Poulsen, Víkingur og Maria Samuelsen úr 07 Vestur.

## HB ongan á landsliðnum

Fróði Benjaminsen noyddist í gjár at geva avboð til landsliðið. Verjuleikarin hevur fingið staðfest eitt brot í fótinum, sum heldur hann burtur frá fótbóltinum komandi vikurnar. Toftamaðurin var hesa ferð einasti leikarin úr HB, sum var úttikin. Nú hann ikki verður tøkur er høvuðsstaðarfelagið í tí sjáldsomu støðu, at ikki hava nakran landsliðsleikaran. Vagnur Mohr Mortesen, Mortan úr Hørg, Andrew av Fløtum, Rókur av Fløtum Jespersen og Kári Nielsen hava áður verið á landsliðnum, men eru ikki við hesaferð.

EB/Streymur - Skála:

# Góðar vónir í Sundalagnum

**- Liðið, sum spældi mikukvøldið, líktist ikki einum liði í kreppu, sigur Egil á Bø, liðformaður hjá EB/Streymi**

UPPTAKT
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



*EB/Streymur er nú aftur stórfavorittur til at vinna føroyameistaraheitið*

EB/Streymur er nú aftur stórfavorittur til at vinna føroyameistaraheitið. Soleiðis var støðan ikki undan summarsteðginum, tá sundalagsmenn óvæntað taptu tríggjar ferðir upp í slag. Fjarstøðan til nærmastu kappingarneytarnar úr NSÍ var fimm stig. Men nú er munurin aftur øktur. EB/Streymur hevur beina kós móti fyrsta FM-heitinum í søgu felagsins við átta stigum niður til annað plássi. Sunnudagin eitur uppgávan Skála á heimavølli.

Egil á Bø, niðurtúrurin hjá EB/Streymi – hevur hann fingið ein enda?

- Liðið, sum spældi mikukvøldið, líktist ikki einum liði í kreppu. Nú skulu vit bara hugsa um at fáa trý stig hvørjaferð. Eg havi í øllum førum góðar vónir, sigur Egil á Bø, liðformaður, sum fyri fyrstu ferð fekk landsliðsboð í gjár.

Sigfríður Clementsen, venjari, hevur somu mans tøkar sum mikudagin. Høgni Zachariasen er langtíðarskaddur, meðan Peter Foldgast er í Danmark, har hann er skurðviðgjørdur fyri skaða í knænum.

### Vanta tríggjar leikarar

Á Skála eru teir bjartskygdir. Liðið vann sær trý týðandi stig, tá ÍF vitjaði mikukvøldið, og hóast skálamenn vitja hjá oddaliðnum um vikuskiftið, so eru vónirnar góðar.

- Tað er torført at siga, hvat vit vænta. Vit fara at gera alt fyri at fáa stig, og tað meta vit als ikki verða ómøguligt. Vit hava fingið sjálvsálit frá sigrinum móti fuglfirðingum, men EB/Streymur vann somuleiðis á NSÍ, so har skuldi lagið eisini verið gott, sigur John Petersen, venjari hjá Skála.

Verjuleikarin Arnhold Berg fekk gult kort mikukvøldið, og er leikbannaður til dystin við Margáir. Teitur R. Joensen og Jógvan Joensen eru ikki tøkir vegna skaða, men rumenin Vali Miela er aftur klárur. Hann var leikbannaður seinast.

## Dystir um vikuskiftið

**1. deild, leygardagin, 9. august:**
AB – B68 Klokkan 15.00, Argir
Rói Jacobsen

TB – KÍ Klokkan 15.00, Tvøroyri
Andrew Christiansen

07 Vestur – HB Klokkan 15.00, Sørvágur
Alex Troleis

Víkingur – NSÍ Klokkan 15.00, Leirvík
Høgni Hansen

EB/Streymur – VB/Sumba Klokkan 15.00, Streymnes
Jan Skoradal

**Formuladeildin: Sunnudagin, 10. august:**
B36 – HB Klokkan 15.00, Tórshavn
Petur Reinert
Víkingur – B71 Klokkan 15.00, Gøta
Páll Augustinusen
EB/Streymur – Skála Klokkan 15.00, Streymnes
Lars Müller

**Mánadagin, 11. august:**
ÍF – B68 Fuglafjørður
Dagfinn Olsen

**Týsdagin, 12. august:**
NSÍ – KÍ Klokkan 19.00, Runavík
Ransin Djurhuus

**Formula-deildin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 16 | 11 | - | 2 | - | 3 | 32 | 17 | 15 | 35 |
| 2 B36 | 16 | 7 | - | 6 | - | 3 | 19 | 12 | 7 | 27 |
| 3 NSÍ | 16 | 8 | - | 3 | - | 5 | 23 | 19 | 4 | 27 |
| 4 HB | 16 | 7 | - | 5 | - | 4 | 30 | 13 | 17 | 26 |
| 5 Víkingur | 16 | 7 | - | 4 | - | 5 | 26 | 18 | 8 | 25 |
| 6 ÍF | 16 | 6 | - | 2 | - | 8 | 21 | 28 | -7 | 20 |
| 7 KÍ | 16 | 4 | - | 5 | - | 7 | 18 | 24 | -6 | 17 |
| 8 B68 | 16 | 5 | - | 2 | - | 9 | 10 | 27 | -17 | 17 |
| 9 B71 | 16 | 4 | - | 2 | - | 10 | 17 | 27 | -10 | 14 |
| 10 Skála | 16 | 3 | - | 5 | - | 8 | 14 | 25 | -11 | 14 |

**1. deild**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AB | 16 | 12 | - | 1 | - | 3 | 61 | 20 | 41 | 37 |
| 2 07 Vestur | 16 | 12 | - | 1 | - | 3 | 64 | 24 | 40 | 37 |
| 3 VB/S | 16 | 12 | - | 1 | - | 3 | 40 | 15 | 25 | 37 |
| 4 TB | 16 | 9 | - | 2 | - | 5 | 43 | 15 | 28 | 29 |
| 5 Víkingur | 16 | 6 | - | 3 | - | 7 | 22 | 40 | -18 | 21 |
| 6 HB | 15 | 4 | - | 5 | - | 6 | 21 | 23 | -2 | 17 |
| 7 KÍ | 15 | 4 | - | 2 | - | 9 | 19 | 47 | -28 | 14 |
| 8 NSÍ | 16 | 3 | - | 4 | - | 9 | 32 | 46 | -14 | 13 |
| 9 B68 | 16 | 3 | - | 2 | - | 11 | 21 | 44 | -23 | 11 |
| 10 EB/S | 16 | 3 | - | 1 | - | 12 | 13 | 62 | -49 | 10 |

Víkingur – B71:

# Mannfall í Gøtu

**Anton Skoradal, venjari hjá Víkingi, verður noyddur at manna nýggja verju sunnudagin, nú Hans Jørgen Djurhuus, Niclas Niclasen og Atli Gregersen eru leikbannaðir. Tað er Andreas Lava Olsen eisini, meðan Magnus Skoralíð er burturstaddur**

UPPTAKT
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Eitt stig í Gundadali mikukvøldið gjørdist sera dýrt hjá Víkingi. Fýra leikarar fingu gult kort, tá samansetta felagið vitjaði HB. Tað er nú einki óvanligt í tí. Men hesir eru allir leikbannaðir, tá B71 vitjar í Gøtu sunnudagin. Hans Jørgen Djurhuus var útvístur, meðan Niclas Niclasen, Atli Gregersen og Andreas Lava Olsen fingu sítt fimta gula kort í hesum kappingarárinum, sum hevur leikbann við sær. Eisini er Magnus Skoralíð burturstaddur.

- Tað verður eingin trupulleiki hjá mær at manna nýggja verju. Eykaliðið stendur seg væl í næstbestu deildini, og summir fáa møguleikan. Vit seta altíð nøsina upp móti trimum stigum, líka mikið, hvat fólk vit hava, sigur Anton Skoradal, venjari, sum roynir at vinna Víking altjóða luttøku í komandi kappingarári.

### Gudmund og Eirikur úti

Eftir tríggjar sigrar upp í slag steðgaði sigursrøðin hjá B71, tá B36 vitjaði inni í Dal mikudagin. Eli Hentze, venjari, staðfestir, at sandoyingar framvegis er í niðurflytingarvanda, hóast tað undan summarsteðginum eydnaðist at vinna seg upp um strikuna.

- Vit hava ligið í botninum alt kappingarárið, og tað broytist neyvan komandi vikurnar. Kappingin er sera jøvn, og fimm lið eru í vanda fyri at flyta niður. Fólk hava rópt okkum, B68 og Skála sum niðurflytarar í alt ár, men eg dugi ikki at síggja, hví KÍ og ÍF skulu kenna seg trygg. Øll stig eru kærkomin, og marginalar fara at avgera. Soleiðis verður helst eisini í Gøtu sunnudagin, sigur Eli Hentze, venjari, sum má verða Gudmund Nielsen og Eirikur Poulsen fyri uttan um vikuskiftið.